# s breddum

tvær ferðir høvdu vit tapt tepurt móti grannum okkara úr Íslandi. Forrestin við Arnór Guðjónsson millum málskjúttarnar. Eitt lítið kuriosum, tí Arnór er pápi at Eidur Smára, sum í kapping við Asgeir Sigurðvinsson er mest gávaði spælarin, sum Ísland hevur fostrað. Og sum eisini hevur skorað móti Føroyum.

Men bæði Ísland og Canada taldust millum pinkurnar í altjóða fótbólti. Í undankapping rendi tú teg eisini í stóru kanónirnar, so tað kundi næstan bara enda galið vóru fólk á einum máli um.

Og so var tað eisini spurningurin um heimavøllin. Altjóða dystir kravdu grasvøll og stadionfacilitetir, sum als ikki funnust í Føroyum. Og at gera avtalu við okkurt bygdafelag í Svøríki var um nakað enn meira ørligt enn sjálv avgerðin um at taka lut í undankappingini.

## Turrgeldar álopsstjørnur

Og tosið gjørdist ikki minni, tá londini vórðu drigin úr pottinum hjá UEFA.

Bara Danmark í sjálvum sær gjørdi lutakastið til nakað heilt serligt. Jugoslavisku bóltsnillingarnir gjørdu tað ikki verri, og so var tað eisini Eysturríki. Eitt land, hvørs stórtíð kanska var farin, men sum við Polster og Rodax sum hartskjótandi framherjum í sponsku la Liga nú brádliga varð nevnt sum ein av outsidarunum til komandi HM-kappingina í Italia.

Tað gekst tó ikki eftir vild hjá Polster, Rodax og hinum í Italia. Og enn minni gekk tað eftir vild í Landskrona henda minniliga heystardagin.

Polster, sum nøkur ár seinni varð kosin vandamesti áleyparin í heiminum av altjóða fótbóltshagfrøðingum, hevði annars sagt, at alt undir 10-0 var ein fiasko fyri eysturríkarar. Og venjarin, Hickersberger, helt tað vera eitt fínt høvi hjá hópinum til eina lítla ferð í Keypmannahavn. At venja og fyrireika seg til dystin annars, høvdu teir so ikki fyri neyðini.

Sjálvandi var hepnið við okkum, tí eysturríkar høvdu sínar møguleikar. Men teir vóru ikki nóg konsentreraðir, tá møguleikarnir vóru har, og á tann hátt løgdu teir sjálvir upp til sensatiónina við síni líkasælu og arrogansu í fyrireikingunum. Ja, at enda mátti núverandi Dimmu-stjórin




*Maskinmeistarin úr Miðvági pakkaði toppskjúttan hjá Sevilla so ruddiliga inn. Polster hevði annars tosað um tveysiffrað máltal, men tað varð nú av ongum*

og táverandi sjónvarpsspeakarin bara gruna um, hvat liðfelagarnir hjá Polster í spanska Sevilla fóru at siga, tá hann nipin mátti greiða frá, at ein maskinmeistari úr Miðvági hevði hildið sær væl og virðiliga niðri alla tíðina.

## Effektin livir enn

Fram um Mikkjal, Tummas Eli, Jóannes, Jan, Julian, Allan, Kára, Abraham og Kurt, so vóru tó tveir mans, sum stjólu yvirskriftirnar.

Annar var ikki óvæntað Torkil Nielsen, sum við máli sínum – og stórspæli annars – feldi risan. Hin var Jens Martin Knudsen – ella the keeper with the bubble cap, sum hann brádliga varð róptur kring allan heim.

Júst hetta skuldi síðani at vísa seg at gerast sterkasta ímyndin av føroyskari tjóðarbranding nakrantíð.

Vit kunnu tosa leingi um, at list selur fisk og Føroyar í fjør vórðu kosnar sum heimsins vakrasta oyggjasamfelag. Veruleikin er, at topphúgvan hjá Jens Martini man hava selt fleiri ferðaseðlar til Føroya enn nakað annað einstakt fyribrigdi. Ja, helst man hon vera einasta topphúgva, sum er sýnd fram á einum altjóða virdum savni.

Og hvussu nógvar lýsingaherferðir føroyskar fyritøkur enn hava staðið fyri, so kunnu hesar neyvan máta seg við ta umtalu, sum føroyska fótbóltslandsliðið seinastu 19 árini hevur givið okkum í eitt nú týskum, fronskum og italskum miðlum.

Og herfyri fingu útsendu tíðindafólkini í Graz eisini at kenna, at Landskrona enn livir sítt góða lív í Eysturríki.

Tað kann væl vera, at Eysturríki hesa ferð vann 3-1 á Føroyum. Men á ferðini vórðu vit støðugt mint á eina fortíð, sum onkursvegna støðugt verður dyrkað í alpulandinum, hóast tey mest av øllum vilja gloyma hana.

Soleiðis vóru størstu stjørnurnar á føroyska landsliðnum teir báðir hjálparvenjararnir, sum áttu hvør sín lyklaleiklut í Landskrona. Og tá Jan Dam, ið var komin niður at hyggja, gekk út frá spælarahotellinum, varð hann alt fyri eitt kendur aftur, sum ein av teimum, ið vóru í Landskrona.

Neyvan vildi tað hent fyri nakran av føroysku toppunum á opnari gøtu í fremmandum landi. Tað skuldi líka verið løgmaður. Men tað hevði ikki verið grundað á núverandi støðu hansara, at tey høvdu kent hann!